# Val av UMBOÐSRÁÐI fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar

**Í ár skulu 12 fólk veljast til umboðsráðið í Tryggingarfelagnum Føroyar. Innkomin valevni eru hesi:**

Gunnleivur Dalsgarð, Varðabú 32, Tórshavn
Egon Hansen, Fútaleg 14, Tórshavn
Hanus Hansen, Undir Brúnni 22, Klaksvík
Dánjal Petur Højgaard, Djúpagilsvegur 14, Hoyvík
Emil Jacobsen, Skáli
Kári Jespersen, Millum Gilja 35, Hoyvík
Olaus Jespersen, Lambagerði 10, Tórshavn
Dan Joensen, Traðagøta 24, Argir
Eyðbjørg Kass, Álvastígur 5, Tórshavn
Jákup S. Lauritsen, Sørvágur
Jógvan Lützen, Stoksoyrarvegur, Klaksvík
J. Birgir Mohr, Sandur
Jan Müller, Sleipnisgøta 10, Tórshavn
Knútur Nygaard, Tvøroyri
Hildur Patursson, Frælsið 26, Tórshavn
Páll Petersen, Kaldbak
Ronald Poulsen, Turiðargøta 27, Tórshavn
Jákup Sólstein, Nýggivegur 20, Klaksvík
Mamy Dahl Sørensen, Viðareiði
Magnus Tausen, Noregsvegur 5, Tórshavn
Schandorff Vang, Oyrarbakki
Andrias Ziska, Varðabrekka 3, Tórshavn

**Atkvøðurættur**
Atkvøðurætt hava øll, sum hava verið tryggingartakarar í felagnum síðani 1. januar 2002.

Tryggingartakarar, har árliga tryggingargjaldið í 2001 var minni enn kr. 50.000,-, hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar kr. 50.000,- í árligum tryggingargjaldi harafturat, fær limurin 1 atkvøðu upp til í alt 10 atkvøður.

Tað ber ikki til at atkvøða við fulltrú.

**Atkvøðuseðil og tíðarfreist**
Atkvøðuseðlar kunnu frá í dag 13. februar 2002 til og við 26. februar 2002 fáast á avgreiðslum felagsins og á øllum posthúsum, og skulu í seinasta lagi 4. mars 2002 verða stjórnini í Tryggingarfelagnum Føroyum í hendi í undirskrivaðum líki. Navn og bústaður skal framganga týðiliga á seðlinum.

Á atkvøðuseðlinum verður uppgivið tryggingarskjalsnummar á teimum tryggingum, atkvøðurætturin skal nýtast til.

**Valúrslit**
Tá valúrslitið fyriliggur verður tað almannakunngjørt í fjølmiðlunum.

**Tórshavn 13. februar 2002**

**S/F Tryggingarfelagið Føroyar**
**Stjórnin**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin, P.O.Box 329, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Tel+298 345600, Fax+298 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

SANSIR - TEL 355 355

---

Fígging av verkætlanum frá

**NORA**
Norrønt Atlantssamstarv
**&**
**NORÐURMÓT**
Northern Periphery Programme

# Kunningarfundur

**Hósdagin, 14. februar 2002 kl. 14.00**
**á Hotel Hafnia**

Á fundinum kunnar Kaspar Lytthans, stjóri hjá Nora, um báðar menningarætlanirnar, herímillum hvat stuðul verður veittur til, hvør kann søkja, umsóknarfreistir og hvussu ein kemur frá at hava eitt hugskot til at fáa stuðul frá Nora og Norðurmót ætlanini.

NORA er økissamstarv undir Norðurlanda Ráðharraráðnum, ið fevnir um Grønland, Ísland, Noreg og Føroyar.

Northern Periphery Programme er evropeisk økismenningarætlan, sum er sett í verk av ES. Luttakandi londini eru Finnland, Svøríki, Noreg, Skotland, Grønland, Ísland og Føroyar.

---

**AUTO**
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK



AUTO 311234

---

**Uppsetan og skipan av barrum**
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Receptiónir
og tilikt

Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

---

www.sosialurin.fo

**Sosialurin**
Lesið Sosialin - tað loysir seg



# Deild í Saltangará

**Skrivstova okkara hevur nú opnað deild í Saltangará. Vit halda til í nýggja bygninginum hjá P/F Snaraløki, Heiðavegur, Saltangará.**



Opið er tvær ferðir um vikuna, hósdag og fríggjadag kl. 9⁰⁰-12⁰⁰ og 13⁰⁰-16⁰⁰.

Tlf. nr. er 471145 og telefax 471146. Hinar dagarnar kunnu avtalur eisini gerast við at venda sær til skrivstovuna í Havn.

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6 · 110 Tórshavn
Tlf. 311145 · Telefax 311525
e-mail: advlaw@advlaw.fo

---

# Politiið í Runavík nýtt telefonnummar

Politistøðin í Runavík hevur fingið nýtt telefonnummar og nýtt telefaxnummar.

Nýggju numrini eru:

**telefon 471448**
**telefax 471449**

Fyrstu tíðina vegleiður ein telefonsvarari, um tygum av óvart hava ringt til gomlu numrini.

Kristjan Martin Joensen
sýslumaður fg.

---

# Ferðavinnan í Eysturoynni

Aðalfundurin hjá Ferðavinnuni í Eysturoy, sum varð lýstur at vera týsdagin hin 19. februar 2002, er útsettur til **týsdagin 26. februar 2002**. Fundurin verður kl. 20 í Studentaskúlanum á Kambsdali. Skrá sambært viðtøkum.

**Ferðavinnan í Eysturoynni**

---

# Ársaðalfundur hjá Í.F.

Aðalfundurin verður á Muntra mánakvøldið 25. februar 2002, kl. 20.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3315
Navn: Sp/f Wenzel Bilaleiga

Adressa: Akranesgøta 5, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 07.02.2002
Viðtøkudato: 07.02.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Óla Svenn Nolsøe, Blankagøta 11, 100 Tórshavn.
Stjórn: Óla Svenn Nolsøe, Blankagøta 11, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Gladsheyggi, Fo-100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 07.02.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka útleigan, handil, tænastur og aðra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 11. februar 2002

Kristin Balle

---

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Á Eysturoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 20 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: eysturoy@tollskatt.fo

# Størv

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, eru hesi størv leys at søkja:

**Fyribilsstarv** til setan 1. mars 2002 og fram til 1. august 2002.

**Høvuðsuppgávur**
Málsviðgerð í samband við skuldarinnkrevjing.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika. Viðkomandi skal vera fyrikomandi og arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt. Kunnleiki til EDV á brúkarastøði er ein treyt.

**Fast starv** til setan 1. mars 2002, ella so skjótt til ber.

**Høvuðsuppgávur**
Álíkningar- og eftirlitsarbeiði av roknskaparskyldugum og partafeløgum. Málsviðgerð og eftirlit innan skatt, meirvirðisgjald, toll v.m., herundir at ummæla møgulig kærumál.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika. Umsøkjarar við roknskaparligari útbúgving hava fyrimun. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna leggja sítt egna arbeiði til rættis.

**Vit kunnu bjóða**
- spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi
- flextíð
- sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið ella BLF.

Núverandi setanarøkið er Eysturoyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Viðkomandi, ið settur verður, skal vera fúsur at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar.

**Nærri frágreiðing um størvini** fæst við at venda sær til Ingolf Lamhauge á tlf. 44 85 88.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, í hendi í seinasta lagi:

**22. februar 2002**

Toll- og Skattstova Føroya
Eysturoyar Øki
Postsmoga 225
FO-600 Saltangará

---

Sosialurin i Sosialurin